

stuðlaði uppundir, nevniliga Robert McBirnie, sum sang fleiri sangir, har Ad libitum spældi undir.

Og fyri at seta seinasta kryddið á konsertina, hevði Robert fingið Jógvan Dahl at taka nakrar gamlarar travarar saman við sær.

Ein av oddamonnunum í Ad-Libitum, Thomas Michael Smith, sigur, at dreymurin um at gera eina fløgu er farin at spøkja aftur í bólkinum.

Teir hava fitt av tilfarið upptøkum liggjandi, so kanska fáa teir tikið sær um reiggj at geva fløguna út. Men um tað verður, og nær, hevur hann als onki boð uppá beint nú.

Men tað er greitt, at konsertin í Miðlahúsinum vísti, at tað er ein ávísur áhugi fyri hesum tónleikinum, vit spæla og tað hevur avgjørt eggjat til at gera fløguna, leggur hann afturat.

Hann sigur, at yvirhøvur merkja teir, at teir eru langt frá gloymdir, tí tað kemur meiri enn so fyri, at teir verða bidnir at spæla.

Eftir konsertina í Miðlahúsinum var tað eisini ein, sum spurdi, um vit vóru upptiknir í alt summar. So galið er tað ikki, tí tað er lættari sagt enn gjørt at samla orkestrið.

– Vit eru allir komnir upp í árini og tað er ikki so lætt at savna truppin, tí tað er verri enn so altíð, at allir hava tíð ísetnn. Tað er eisini ein orsøk til, at tað er so langt ímillum at vit spæla og at vit ikki fáa langt ætlanir fram í tíðina, sigur Thomas Michael Smith.

Hann leggur afturat, at hjá teimum er tað eitt hugnaligt frítíðarítriv burturav, so tað skal ikki vera ov bundið.

Annars heldur hann, at Miðlahúsið í Vágsbotni er eitt sera væl hóskandi høli til smærri tiltøk, sum hesi, tí tað er nossligt og avbera hugnaligt inni.

Hann sigur eisini, at ljóðið í hølunum er sera gott.

– Á konsertini seinasta fríggjakvøld høvdu við nakrar tøkniligar trupulleikar í fyrstuni, so vit spældu eini tvey løg, uttan nakra sum helst elektriska styrki yvirhøvur og tað hoyrdist fínt.

Teir, sum manna Ad Libitum, eru: Thomas Michael Smith, Svenn Brimheim, Hans Chr. Clementsen, Heðin Thomsen og Fróði Sandoy. Annars plagar Kolbein Simonsen eisini at hjálpa til við bassinum viðhvørt.



### Tónleikur við hvíld í

Eisini áhoyrararnir vóru stak væl nøgdir. Nøkur, vit tosaðu við søgdu á, at hetta er, sum teimum dámar Ad Libitum..

– Tað er ordiliga deiligur tónleikur. Hetta er tónleikur, sum fellur sera væl í oyrað og tað er rættilig hvíld í at sita og lurta eftir teimum, segði ein áhoyrari eftir konsertini.

– Hetta er tónleikur, sum hevur ógvuliga jaliga ávirkan á áhoyrararnar, varð lagt afturat.

Áhoyrarunum dáma eisini rættiliga væl Miðlahúsið til smærri konsertir.

– Tað er hugnaligt inni og og tað vísir seg at ljóða gott inni, hóast tað ikki er so nógvur streymur á ljóðførunum, søgdu áhoyrarar eftir konsertina.